FÓLKATINGSVALIÐ 2001

# Hvat verður av okkara ríkisborgararættindum, um samgongan gjøgnumførir loysingina?

**Atli Hansen**
*fólkatingsvalevni sambandsflokksins*



Tað kann ikki endurtakast nóg ofta, at bæðið hetta fólkatingsvalið og kanska serliga komandi løgtingsval, vera val millum samband og loysing. Samgongan hevur proklamerað, at hon vil loysing og fær hon politiska makt til tað, so verður loyst og so vendist ikki aftur.

Nógv hevur verið gjørt burtur úr at lýsa tær búskaparligu avleiðingar, sum kunnu standast av at skunda eina loysing ígjøgnum. Eingin kann neyvt siga, hvat íð fer at henda, men at fylgjurnar vera ógvusligar, eru tey flestu á einum máli um.

Men eisini á nógvum øðrum økjum fara dramatiskar broytingar at vera - eitt nú viðvíkjandi okkara ríkisborgaraskapi. Og hvat vil tað so siga?.

Sum limir í einum ríkisfelagsskapi hava vit ein og sama borgararætt sum hinir limirnir í felagsskapinum. Hesin borgararættur staðfestir nøkur rættindir, sum vit til eina og hvørja tíð kunnu gera brúk av. Hetta merkir m.a., at vit kunnu flyta til annan part av ríkinum og frá fyrsta degi hava sama rætt sum íbúgvarnir har - eisini valrætt. Vit kunnu brúka allar undirvísingarskipanir, fáa sama lestrarstuðul, brúka sjúkrahúsverkið, allar sosialar skipanir herundir fólka- og avlamispensiónir, arbeiðsloysisskipanina o.s.fr.v.

Og hvat hendir so, um samgongan fær gjørt álvara av at loysa?

Nyrup hevur greitt sagt, at so missa vit okkara danska ríkisborgaraskap. Danmark kann ikki levera ríkisborgaraskap til allar borgarnar í einum øðrum landi - Føroyum. Vilja vit melda okkum út úr felagsskapinum, so hanga vit í leysum lofti hvat íð hesum viðvíkur. Ein undarligur tanki at hugsa sær.

Tað er tí umráðandi fyri okkum, sum ganga inn fyri ríkisfelagsskapinum, at standa saman og og arbeiða fyri at víðka skaran av teimum, sum siga nei til at missa tey rættindini, sum vit hava vunni okkum gjøgnum okkara danska ríkisborgaraskap.

Sigi ja til ríkisfelagsskapin og nei til loysingina.

Veljið Sambandsflokkin.

# Stórlætisørskapur byggir ikki land

**Hans Jørgensen**
*fólkatingsvalevni Javnaðarfloksins*



Tað nyttar ikki at billa fólki inn, at nakar annar enn vit sjálvi avgera framtíð okkara. Vit kunnu fara úr ríkisfelagsskapinum. Men vit kunnu eisini átaka okkum fulla ábyrgd og fullan kostnað av landi okkara innan ríkiskarmarnar. Loysingin er loysn samgongunar. Sjálvstýri í ríkisfelagsskapi er okkara loysn.

Sjálvsavgerðarrættin hava vit. Tað er eingin heimsins tjóð ella ríki, sum forðar okkum at taka okkara egnu avgerð. Tí er tað so mannminkandi alla tíðina at billa fólki inn, at danir og Nyrup niðurbinda okkum og hava tikið sjálvsavgerðarrættin frá okkum.

Syndarligasta avleiðingin av politikki samgongunar er, at meðan keglast verður um fullveldi, verður solidariska skipanin tagað sundur og oyðiløgd.

Fólk stara seg blind í fullveldiskeglinum, og tá fullveldið skal ganga fram um alt annað, so er vandi á ferð. Lat meg siga tað greitt, at fyri mær er fullveldisætlan landsstýrisins er stórlætisørskapur. Tað er stórlætisørskapur at taka vælferðina og lívsfrælsið frá vanliga føroyinginum.

**Javnaðarflokkurin er ein frælsisflokkur**

Okkara politikkur er at skapa fortreytir hjá tí einstaka føroyinginum at liva eitt frælst lív saman við øllum hinum her á landi.

Alt annað enn solidaritetur og umsorgan fyri hvørjum øðrum, vekir andstygd í okkara hugaheimi.

- Tá vit uppliva, at samgongan einki ger fyri at bøta munandi um pensjónina til teirra, sum bygdu framkomna samfelag okkara, so kalli eg einvísu minkingina av heildaveitingini uppá 356 mió kr fyri stórlætisørskap.
- Tá eg upplivi, at okkara gomlu liggja hjálparleys, einki heim hava at fara í, tá heilsan ikki loyvir teimum eitt sámuligt lív heima hjá sær sjálvum, so kalli eg einvísu minkingina av heildaveitingini uppá 356 mió kr fyri stórlætisørskap.
- Tá vit uppliva, at heilsuverkið fúnar burtur og ikki fær loyvi at virka alt árið, at sjúk fólk verða víst av sjúkrahúsinum, tí deildir lata aftur, samstundis sum onnur bíða í mánaðir fyri at fáa neyðuga viðgerð, so kalli eg einvísu minkingina av heildaveitingini uppá 356 mió kr fyri stórlætisørskap.
- Tá vit uppliva, at skúlaverkinum vantar umstøður at virka á nøktandi stigi, og uppvaksandi ættarliðið harvið verður verri fyri enn gott er, so kalli eg einvísu minkingina av heildaveitingini uppá 356 mió kr fyri stórlætisørskap.

Eg kundi hildið fram. Veruleikin er, at gribbarnir (teir borgarligu) hava góðar dagar.

Stutt sagt: ein og hvør ætlan, sum brýtur niður vælferðarmynstrið, og sum elur sjálvgóðsku og "sektin á hvat annar fær, eg skal nøra at mær" hugsunaháttinum, er fyri mær av tí ónda.

Tað er henda niðurbrótingin, sum fer fram í kjalarvørrinum av harðrendu fullveldisætlan landsstýrisins.

Vit fara at biðja teg venda hesi gongd við at geva Javnaðarflokkinum tína atkvøðu 20. november.

# Framtíðin hjá útjaðaranum

**Finnleif Guttesen**
*fólkatingsalevni fyri Sambandsflokkin*



Suðringum, Norðingum, Sandingum og útoyggjum annars.

Við verandi samgongu, soleiðis sum hon hevur hóreiggja sær í ríkisfelagsskapinum og við tí vísta politikki, kann ikk vantast framstig hjá og í útjaðarinum.

- Vilja tit hava ein útjaðara og útoyggja politik sum gagnar hesum oyggjum, so at øll vit sum vilja búleikast á teimun, kunnu hava og fáa eina virðiliga framtíð á hesum vøkru oyggjum?
- Vilja tit, at vælferðin hjá teimun gomlu og veiku á hesum oyggjum, skal tryggjast og betrast?
- Vilja tit hava útbygt vegakervi og tunnlar og hesum oyggjum, sum eru frá fimti og seksti árinum, so at ferðslan og trygdin blívur munadi betri hjá øllum?
- Vilja tit hava eitt tíðarhóskandi ferðamannaskip at sigla millum Suðuroy og miðstaðarøki, so at tað verður høgligari at ferðast um suðuroyarfjørð?
- Vilja tit hava ein undirsjóðartunnil um Lorvíksfjørð, so at sambandi millum Norðoyggjar, miðstaðarøki og restina av Føroyum blívur munandi betri.?
- Vilja tit varveita Føroyagrunnin í Norðoyggjum og hvør fíggjaði grunnin?
- Vilja tit hava ein undirsjóðartunnil um Skopunarfjørð, so at sambandi til miðstaðarøki og restina av Føroyum blívur munandi betri?

Taka tit undir við hesum, siti so ikki heima 20. november, men fari á val og seti krossin við eitt av umboðum Sambandsflokksins, hetta merkir eisini eina atkvøðu fyri frælsið.

Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!



FÓLKATINGSVALIÐ 2001

# Okkara merki skal veittra millum hini

**Høgni Hoydal**
*Valevni Tjóðveldisfloksins*



Í danska fólkatinginum sita meira enn 170 limir. Tey umboða danska fólkið og velja eina stjórn, sum umboðar tey í øllum viðurskiftum. Tað virða vit og fegnast um vegna danska fólkið. Tey hava fult fólkaræði sum tjóð. Tey hava fullveldi.

Men sum støðan er í løtuni, so gera tey eisini av nógv viðurskifti, sum raka okkum føroyingar.

Tey gera av, hvør sleppur inn og út úr Føroyum. Tey gera av, hvør skal revsast, hvør er dómari og hvat løgreglan kann gera. Tey gera av, hvør sleppur at giftast og skiljast og hvørji rættindi tú eg hava í Føroyum. Tey gera av, hvussu eftirlitið er við okkara bankum og fíggjarstovnum og áleggja treytir, sum frá degi til dags kunnu broyta lívið hjá okkum í Føroyum. Hetta kendu allir føroyingar undir bankakreppuni, tá tær veikastu herðarnar fingu rokningina fyri spekulasjón og ábyrgdarloysi.

**Skilja hvørki mál, søgu ella Merkið**

Men tey skilja ikki okkara mál. Kenna ikki okkara søgu ella livikor. Nærum ongin kennir okkara flagg - okkara Merki. (Ein teirra, sum varð spurdur í donskum sjónvarpi um hann kendi Merkið, varð Ole Stavad, danski vinnumálaráðharrin. Hann kendi ikki okkara flagg. Men sami Ole Stavad, var tann fyrsti at koma til Føroya á fund hjá føroyska javnaðarflokkinum í Skopun at siga føroyingum, hvat vit høvdu at gera. Um vit vildu taka fulla ábyrgd av landnum, so fóru danir at hótta við pengum beinanvegin, segði hann longu í 1998).

Og fólkatingið viðurkennir ikki føroyingar, sum eitt fólk - sum eina tjóð - ið er javnbjóðis og javnsett. Tí eru viðurskiftini so óvirðilig og tí ber ongantíð til at samráðast sum fólk, tá føroyingar samráðast við danskar myndugleikar. Vit hava ikki fult fólkaræði í Føroyum.

**Ein fræls rødd fyri tjóðina**

Tjóðveldisflokkurin vil, at okkara Merki skal veittra millum hini. Tjóðveldisflokkurin vil, at vit føroyingar taka fulla ábyrgd av øllum okkara viðurskiftum, Tjóðveldisflokkurin vil, at tað er Føroya fólk, sum gjøgnum meira enn 40 ættarlið hevur bygt hetta land, ið hevur alt fólkaræðið í Føroyum. Og so samstarva vit við Danmark, sum sjálvstøðug lond - virðiliga og javnbjóðis.

Tað hevur ongantíð verið meira týdningarmikið enn nú, at ein óheft og fræls føroysk rødd dugir at greiða donskum politikarum og danska fólkinum frá hesum. Tað hevur ongantíð verið meira týdningarmikið enn nú, tá vit eru á veg móti fullum sjálvræði og ábyrgd, at vit fáa eina rødd á fólkating, ið kann skapa virðing fyri føroyingum og tjóðini. Sum kann vísa á, at síðani vit fóru at seta blokkstuðulin til viks, hava vit fingið eitt sunnari og meira samhaldsfast samfelag í Føroyum.

Hetta kann bert eitt tjóðveldisumboð gera. Og tí heiti eg á allar føroyingar, ið vilja sjálvsvirðingina og javnstøðuna um at fara á val og velja Tjóðveldisflokkin ella eitt av teimum góðu valevnunum á listanum.

# Skulu vit bara lata Danmark gjalda

**Sámal Petur í Grund**
*Valevni Sjálvstýrisfloksins*



Søguliga sæð, so hava vit sum Føroyingar verið ein inntøkukelda fyri tað kongadømi sum vit hava verið partur av.

Tað kann staðfestast longu í fornaldarsøgu okkara, hvar umboðsmenn fyri kongsveldi jú kravdu skatt upp í Føroyum og fóru av landinum við honum.

Eisini einahandilstíðin í miðaldarsøgu okkara, hvar ymiskir forvaltarar sendu pening av landinum er staðfesting um hesa sannroynd.

Einahandilstíðin er ikki av, hóast forvaltararnir eru fluttir av landinum. Enn sita forhandlarar í Danmark, sum hava einahandil uppá vørur sum koma uttanlendis frá til Føroya.

Júst hvussu nógvur peningur liggur eftir í danska samfelagnum, av teim handlum sum føroyingar gera við handilsmenn í øðrum londum, er tað helst eingin sum hevur eitt nágreiniligt boð uppá.

Men at talan er um stórar upphæddir er eingin í iva um.

Til fólkatingsvalið hesaferð er støðan greiðari í ríkisrættarliga spurninginum enn nakrantíð fyrr.

Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin fara á fólkatingi at virka fyri framhaldi av eini skipan sum líkist núverandi skipan.

Í beinleiðis útvarpssending sunnukvøldið 11. novembur komu nøkur sjónarmið fram, sum klárt og tíðuliga boðaðu frá hvat føroyingar kunnu vænta sær, um hesir flokkar fáa mann valdan á fólkating.

Umboð sambandsflokksins bar fram, at bæði persónliga frælsið og vælferðin vóru óloysiliga tengd at ríkisfelagsskapinum.

Umboð javnaðarfloksins bar fram, at javnaðarflokkurin vil verja virðini sum liggja í ríkisfelagsskapinum.

Vit sum hava aðra stevnu enn áðurnevndu samríkisflokkar, ynskja at byggja persónliga frælsið og vælferð okkara á egnu virði, herundir eisini tey virði sum av røttum áttu at ligið í føroyska samfelagnum.

# Frælsar røddir tala greitt

**Jógvan Arge**
*valevni tjóðveldisfloksins til fólkastingið*



Tjóðveldisflokkurin fer ikki at lata seg binda niður á fólkatingi. Hann fer heldur ikki at tiga, tá sjálvsøgd føroysk tjóðarrættindi verða vanvird, og hann fer at tala greitt og mótmæla, at føroyingar verða úthongdir sum ein krevjandi útreiðsla fyri statin.

Tjóðveldisflokkurin er til reiðar at samstarva, men bara á jøvnum føti, og hann fer á fólkatingi at vísa á, at hjálandaveldi sambært 40 ára gomlum ST-samtyktum hava skyldu til at virka fyri, at hjálond gerast búskaparliga óheft.

So greiða stevnu hevur ongin annar flokkur. Tá á hevur staðið, eru føroyskar fólkatingsrøddir tagnaðar á Christiansborg. Vegna vantandi støðufesti og sjálvsvirðing hava tær ikki viljað sagt tað, sum sjálvsagt er.

Tvørrandi viljin til at tala søk føroyinga hevur verið ein meinbogi í føroyska sjálvstýrisstríðnum. Men við eini frælsari rødd á fólkatingi fáa føroyingar trygd fyri, at vend kemur í. Hon fer at tala greitt fyri føroyska sjálvstýriskravinum. Og hon fer at tala sakliga og siðiliga.

Tjóðveldisflokkurin heldur, at føroyska tjóðin kemur ikki úr stað, um Føroyar og Danmark ikki fara at samstarva á jøvnum føti. Hetta er eitt sjálvsagt og virðiligt mál at seta sær. Men skal tað røkkast, má hugburðurin í stórum parti av politiska lívinum broytast.

Tað er onki politiskt bragd at siga fólki, at alt verður verri, um føroyingar taka við ábyrgd. Tað hevur onki veruligt politiskt innihald at prædika dómadag í løgtinginum og á fólkatingi.

Forsagnir um undirgang eru ikki annað enn ráðaleysir pástandir út í tóman heim. Tær elva ikki til annað enn ræðslu og minka um sjálvsálitið hjá tjóðini. Tí er umráðandi, at røddir, sum vilja taka við avbjóðingum, tala søk føroyinga.

Valið 20. november er tí einfalt. Ein fræls føroysk rødd má veljast á fólkating.

# Veljið kvinnu á Fólkating

**Elin Lindenskov**
*Fólkatingsvalevni Javnaðarfloksins*



Kvinnur eru vanar at samstarva og at finna loysnir - loysnir í staðin fyri konfrontatiónir. Tí er tað eisini ein kvinna, sum kann nýta ávirkanina á Fólkatingi at loysa naggatódnina millum Føroyar og Danmark.

Eg bjóði meg fram sum kvinnuligt valevni til fólkatingssessin, har eg fari at nýta stóra orku upp á at greiða dønum frá føroyska fólkaynskinum um broytingar í viðurskiftunum millum Føroyar og Danmark.

Eg eri vís í, at tað ber til at samstarva og at finna loysnir. Sjálv havi eg samstarvað við fleiri av donsku kvinnupolitikarunum, og er hetta ein stórur fyrimunur.

Tað er eyðsæð, at tað besta er, at bæði kynini eru umboðað eins væl, har vit velja umboð. Vit mugu tíverri staðfesta, at føroyingar velja ov fáar kvinnur á ting og í kommunustýri - og at vit ongantíð hava valt eina kvinnu á Fólkating. Men í hesum sambandi er vert at hava í huga, at Javnaðarflokkurin átti fyrsta kvinnuliga løgmann, og at nummar 1, 3 og 4 á javnaðarlistanum til býráðið í Havn seinast vóru kvinnur. Til løgtingsvalið í 1998 vóru kvinnur nummar 2 og 3 á javnaðarlistanum. Hetta ber boð um bata.

Eg haldi, at tað er umráðandi, at henda gongdin heldur fram. Tí fari eg at heita á teg:

- Far á val. Vel ein sterkan Javnaðarflokk á Fólkating. Vel samstarv og loysnir. Vel eina javnaðarkvinnu!